# Frágreiðing til aðalfundin hjá Svimjisambandi Føroya




Fyri tíðarskeiðið 27. mars 2021 til 9. apríl 2022

ATLANTIC AIRWAYS

# Felagsskapurin

## Starvsnevnd

Hetta árið var starvsnevnd SSF: Rókur í Jákupsstovu, formaður, Símun Michael Sørensen, næstformaður, Ólavur Hansen, skrivari, Sørin S. Djurhuus og Eyðun Húsgarð, nevndarlimir, umframt Dann Hjelm, tiltakslimur. Starvsnevndarfundir hava verið umleið eina ferð um mánaðin.

## Svimjinevnd

Hetta árið var svimjinevnd SSF: Heri Mortensen, formaður, Bjørg Olsen, næstforkvinna, Rúna í Skála, skrivari, Jytta Friang, varaskrivari, June Jónsveinsdóttir og Eliesar Lydersen, nevndarlimir. Svimjinevndin tekur sær serliga av heimligu kappingunum.

## Dómsnevnd

Hetta árið var dómsnevnd SSF: Anni á Hædd, forkvinna, Poul Poulsen og Jórun Eið Johannesen, nevndarlimir. Hesa tíðina var einki mál sent dómsnevndini at viðgera.

## Dómarar

Útbúnu yvirdómarar SSF eru: Dann Hjelm, Elin Matras, Katja Lervig, Thurid Kjærbo, Annika N. Johannesen og Rúni Gaardbo, harav Dann Hjelm, Katja Lervig og Rúni Gaardbo eru altjóða yvirdómarar, og Erling Eidesgaard og Eyðun Húsgarð altjóða startarar.

Tað er tørvur á at fáa fleiri yvirdómarar, og hava vit tí gjørt samstarvsavtalu við Dansk Svømmeunion, um útbúgving av nýggjum dómarum. Fyrsta av hesum dómaraskeiðum var í Føroyum hin 18. til 20. mars 2022,  og verða nøkur av hesum vónandi útbúgvin til yvirdómarar nú í heyst.

## Svimjiskúlin

Jórun Eið Johannesen er saman við Pálini Olsen og Rúna Gaardbo oddafólk í Svimjiskúla Føroya, umframt at vit hava Johan Petur Poulsen, Lis Gøthe í Jákupsstovu og Rók í Jákupsstovu eisini útbúgvin til at undirvísa í skipanini. Hetta árið hevur verið friðarligt hjá svimjiskúlanum, men eru útlit til meira virksemi nú í 2022, m.a. vegna áhuga frá skúlaskipanini.

## Lívbjarging

Sørin S. Djurhuus stendur saman við Djóna Dalsgarð á odda fyri lívbjargingarátaki okkara, sum serliga fæst við at útbúgva lívbjargarar til okkum í føroysku svimjingini og hjá stovnum, kommunum, skúlum og øðrum felagsskapum, umframt at eftirkanna tilbúgvingina í føroyskum svimjihallum.

Virksemið er serliga at skipa fyri regluligum lívbjargararoyndum, sum eru árlig uppfrískan í lívbjarging og í tilbúgvingini á staðnum, har lívbjargarin virkar. Av tí at hóparnir eru lítlir sum fara til hesar royndir, hevur virksemið kunnað hildið áfram, eisini hóast koronu.

## Landsliðsvenjari

Hin 1. juni 2021 varð Kristian Martin Joensen settur sum landsliðsvenjari SSF, aftaná eina árarekkju síðani síðst í 00-ini har landsliðsvenjarar vórðu funnir til hvørt einstaka tiltak. Korona hevur órógvað nakað, men er landsliðsvirksemið tó so smátt í menning, við legum og luttøku á altjóða stevnum.

## Skrivstova, bókhald og aðalskrivari

Hetta árið hevur undirritaði formaður tikið sær av dagliga virkseminum á skrivstovuni, við hjálp til pengaflytingar frá annars mestsum fráfarna aðalskrivara Djóni Dalsgarð, og til bókhald og ymiskt tøkniligt frá serliga næstformanni Símun Michael Sørensen og skrivara Ólav Hansen.

Í heyst fóru vit so aftur undir tilgongd til at finna nýggjan aðalskrivara, og eydnaðist tað tíbetur so mikið væl, at Ann Ellingsgaard hin 1. mars 2022 kundi byrja í starvi sum nýggjur aðalskrivari SSF. Ann er longu komin væl inn í tingini, og vísir seg at vera ein fongur fyri SSF.

## Felagsskapurin

Afturat okkum sjálvum í nevndum SSF og feløgum, eru nógvar góðar kreftir í svimjingini sum vit dúva uppá, serliga í sambandi við meistarastevnur og landsliðsvirksemi. Hetta er dýrabærur stuðul, ið vit lukkutíð fáa fyri lítið og lætt.

Serliga er árligi kalendarafundurin ein góð kelda til hjálp og konsensus í sambandi við heimligu stevnurnar, umframt svimjiráðstevnan sum vit tíverri ikki funnu pláss til nú í vetur, eisini vegna óvissu og niðurlaging vegna koronu. Ætlanin er at hava ráðstevnu aftur, vónandi longu í mai 2022.

## Limir í føroyskum svimjifeløgum

Nú í mars 2022 vóru tað 966 limir í føroysku svimjifeløgunum, harav 350 í Havnar Svimjifelag (HS), 278 í Ægir, 133 í Svimjifelagnum FLOT, 113 í Suðuroyar Svimjifelag (SuSvim), 52 í Fuglafjarðar Svimjifelag (FS), og 40 í Svimjifelagnum Reysta.

Til samanbering vóru tey í fjør 802 skrásettir limir í føroysku svimjifeløgunum, harav 350 í Havnar Svimjifelag (HS), 143 í Ægir, 106 í Svimjifelagnum FLOT, 100 í Suðuroyar Svimjifelag (SuSvim), 67 í Fuglafjarðar Svimjfelag (FS), og 36 í Svimjifelagnum Reysta.

# Svimjiárið 2020-2021

## FINA stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg og SSF skipaðu hetta svimjiárið fyri tilsamans 14 FINA-góðkendum svimjistevnum í svimjihallum, harav 3 meistarastevnum, har málbólkurin vóru føroysk børn, ung og vaksin. Ein svimjistevna mátti avlýsast vegna veður.

| Stevna | Staður | Dagfesting | Hylur | Kapp. | Feløg | Íðkarar | Lið | Úrslit | FINA* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HS Open | Tórshavn | 12.-13.sep.20 | 25m | 36 | 5 | 75 | 0 | 451 | 685 |
| Ægir Open | Klaksvík | 3.-4. okt.20 | 25m | 37 | 6 | 78 | 41 | 467 | 727 |
| Ægir Open | Klaksvík | 31.okt-1.nov.20 | 25m | 36 | 6 | 100 | 18 | 542 | 747 |
| FMS/JMS | Tórshavn | 13.-15.nov.20 | 25m | 80 | 6 | 71 | 15 | 698 | 759 |
| SuSvim Open - avlýst | Vágur | 12.-13.des.20 | 50m | | | | | | - |
| SuSvim Open | Vágur | 6.-7. feb.21 | 50m | 36 | 5 | 80 | 30 | 508 | 677 |
| Ægir Open | Klaksvík | 20.-21.feb.21 | 25m | 35 | 6 | 100 | 7 | 562 | 695 |
| HS Open | Tórshavn | 13.-14.mar.21 | 25m | 38 | 6 | 97 | 25 | 562 | 651 |
| FS/FLOT/Reysta-stevna | Klaksvík | 20.mar.21 | 25m | 18 | 6 | 113 | 0 | 188 | 497 |
| SuSvim Open | Vágur | 10.-11.apr.21 | 50m | 38 | 5 | 78 | 16 | 477 | 676 |
| HS-stevna | Tórshavn | 17.apr.21 | 25m | 10 | 6 | 99 | 0 | 171 | 461 |
| ABMS | Klaksvík | 30.apr.-2.mai 21 | 25m | 40 | 6 | 74 | 12 | 513 | 522 |
| HS Open | Tórshavn | 22.-23.mai 21 | 25m | 36 | 5 | 81 | 0 | 552 | 698 |
| Atlantic Open | Vágur | 11.-13.jun.21 | 50m | 54 | 5 | 55 | 28 | 492 | 671 |
| FM/JM/Føroyaleikir | Vágur | 9.-11.jul.21 | 50m | 80 | 6 | 57 | 33 | 595 | 717 |

## Aðrar stevnur í føroyskum svimjihallum

Hetta árið varð ikki skipað fyri nakrari svimjistevnu í skúlahyljum stytri enn 25 metrar, av tí at almennu koronutilmælini ynsktu eina so mikið stóra frástøðu millum tey, sum møttu á stevnu, at tað varð hildið at verða ógjørligt at skipa fyri.

Í staðin vóru aðrar loysnir funnar til tey yngru, har Ægir skipaði fyri eini stuttleikastevnu í Klaksvíkar Svimjihøll hin 16. januar 2021, SuSvim fyri eini stevnu, har tey svumu breiddir í Páls Høll hin 6. mars 2021, og FLOT, FS og Reysti fyri eini felags stevnu í Klaksvíkar Svimjihøll hin 20. mars 2021.

Hetta vóru avbjóðandi stevnur, tí at finnast skuldu øðrvísi loysnir, samstundis sum at undirtøkan var sera góð. Sjálvt í størru hallunum var trupult at skapa neyðuga frástøðu, so at t.d. stevnan hin 20. mars mátti umskipast til at svomið varð í bólkum, har tey ikki møttu í høllini fyrr enn neyðugt.

# Uttanlanda og altjóða stevnur

Største partin av hesum svimjiári, kappaðust føroyskir svimjarar slettis ikki uttanlanda, út yvir Signhild Joensen (2000) úr Ægir sum var flutt til Danmarkar at lesa, og tí luttók á stevnum har, við sera hørðum koronaaavmarkingum.

Ímóti sumri bar betri til, so at vit fingu sent landslið til EM, EJM og NMU 2021, um enn hvørja ferð við sera lítlum hópum, og tá enn við rættiliga nógvum avbjóðingum og avmarkingum vegna hesa áhaldandi koronufarsótt.

| Stevna | Land | Dagfesting | Hylur | Íðkarar | Lið | Úrslit | Gull | Silvur | Bronsa | FINA* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| NOM 2020 - avlýst | FAR | 2.-4. okt. 20 | 25m | | | | | | | - |
| NM/NJM 2020 - avlýst | SWE | 4.-6. des. 20 | 25m | | | | | | | - |
| HMS 2020 - avlýst | UAE | 15.-20. des. 20 | 25m | | | | | | | - |
| Dual Meet Allerød | DEN | 19. sep. 20 | 25m | 1 | 0 | 3 | 1 | 1 | 0 | 567 |
| Holdturnering Allerød | DEN | 3. okt. 20 | 25m | 1 | 0 | 2 | 2 | 0 | 0 | 687 |
| Holdturnering Kastrup | DEN | 7. nov. 20 | 25m | 1 | 0 | 3 | 2 | 1 | 0 | 695 |
| DM kortbane Helsingør | DEN | 14.-17. nov. 20 | 25m | 1 | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 673 |
| OL kvalifikation Vejle | DEN | 5.-7. mar. 21 | 50m | 1 | 0 | 4 | 0 | 0 | 0 | 754 |
| EM 2021 | HUN | 17.-23.mai 21 | 50m | 1 | 0 | 3 | 0 | 0 | 0 | 735 |
| EJM 2021 | ITA | 6.-11.jul.21 | 50m | 2 | 0 | 7 | 0 | 0 | 0 | 781 |
| NMU 2021 | LTU | 10.-11.jul.21 | 50m | 2 | 0 | 9 | 0 | 0 | 0 | 599 |

# Landsliðshópar 2020-2021

## EM 2021 í Budapest

**Svimjarar**: Signhild Joensen (2000) úr Ægir

**Venjari**: venjari Signhild fekk forfall, í staðin fingu vit hjálp frá íslendingum

**Ferðaleiðari**: Rannvá Sigfríðsdóttir

## EJM 2021 í Róm

**Svimjarar**: Elisabeth Erlendsdóttir (2005) og Bartal E. Eidesgaard (2003) úr HS

**Venjari**: Panagiotis Christou

**Ferðaleiðari**: Hjørdis Mortensen

## NMU 2021 í Klaipeda

**Svimjarar**: Lea Osberg Højsted (2008) úr Ægir og Jóhanna Ólavsdóttir (2007) úr FS

**Venjari**: Kristian Martin Joensen

**Ferðaleiðari**: Astrid Bergtóra Joensen og Danny Osberg Højsted

# Føroysk met og juniormet

Føroyskir svimjarar settu 9 føroysk met og 5 føroysk juniormet, hetta svimjiárið 2020-2021, tað vil siga frá 1. september 2020 til 30. august 2021.

Til samanberingar settu føroyskir svimjarar tilsamans 5 føroysk met og 4 føroysk juniormet, undanfarna svimjiárið 2019-2020.

## Føroysk met

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x50 | Blandað | 25m | K | 01:59.00 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Eyðrið Mortensen<br>Vár E. Eidesgaard<br>Ronja Ró í Dímun | 2001 | HS | Ægir Open | 2020-11-01 | FAR |
| 4x100 | Frí | 50m | Mix | 04:14.26 | Jonna Joensen<br>Líggjas Joensen<br>Róa Trygvadóttir<br>Heini M. Askham | 2005 | Ægir | Atlantic Open | 2021-06-21 | FAR |
| 4x100 | Frí | 50m | Mix | 04:10.12 | Rúni Dahl<br>Alisa Vestergård<br>Elin Christiansen<br>Bartal Debess | 2002 | SuSvim | Atlantic Open | 2021-06-12 | FAR |
| 4x100 | Frí | 50m | Mix | 04:04.81 | Jonna Joensen<br>Martin Sivertsen<br>Heini M. Askham<br>Lea Osberg Højsted | 2002 | Ægir | Atlantic Open | 2021-06-12 | FAR |
| 4x100 | Blandað | 50m | Mix | 04:56.65 | Bjørg Ólavsdóttir<br>Dortea Dam<br>Isak Brisenfeldt<br>Snorri F. Mortensen | 2004 | HS | Atlantic Open | 2021-06-13 | FAR |
| 4x100 | Blandað | 50m | Mix | 04:45.13 | Bartal Debess<br>Jón Hofgaard<br>Alisa Vestergård<br>Bjørk L. Sørensen | 1992 | SuSvim | Atlantic Open | 2021-06-13 | FAR |
| 4x100 | Blandað | 50m | Mix | 04:35.11 | Elin Christiansen<br>Jón Hofgaard<br>Alisa Vestergård<br>Bartal Debess | 1992 | SuSvim | Atlantic Open | 2021-06-13 | FAR |
| 4x100 | Frí | 50m | Mix | 03:56.41 | Ronja Ró í Dímun<br>Johan N. Dam<br>Villiam M. Samuelsen | 2001 | HS | FM | 2021-07-09 | FAR |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | Vár E. Eidesgaard | | | | | |
| 4x100 | Blandað | 50m | Mix | 04:29.30 | Signhild Joensen<br>Heini M. Askham<br>Malan Jóhansdóttir<br>Martin Sivertsen | 2000 | Ægir | FM | 2021-07-10 | FAR |

## Føroysk juniormet

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x100 | Blandað | 50m | Kyn | 04:39.73 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Ronja Ró í Dímun<br>Kristina í Skála<br>Nancy N. Dam | 2004 | HS | SuSvim Open | 2021-04-10 | FAR |
| 4x100 | Frí | 50m | Mix | 04:14.26 | Jonna Joensen<br>Líggjas Joensen<br>Róa Trygvadóttir<br>Heini M. Askham | 2005 | Ægir | Atlantic Open | 2021-06-12 | FAR |
| 4x100 | Blandað | 50m | Mix | 04:56.65 | Bjørg Ólavsdóttir<br>Dortea Dam<br>Isak Brisenfeldt<br>Snorri F. Mortensen | 2004 | HS | Atlantic Open | 2021-06-13 | FAR |
| 4x100 | Blandað | 50m | Mix | 04:55.43 | Heini M. Askham<br>Sofía Toftegaard<br>Róa Trygvadóttir<br>Hanus Lydersen | 2006 | Ægir | FM | 2021-07-10 | FAR |
| 4x100 | Blandað | 50m | Mix | 04:49.13 | Líggjas Joensen<br>Sofía Toftegaard<br>Jonna Joensen<br>Hanus Lydersen | 2005 | Ægir | FM | 2021-07-10 | FAR |

# Svimjiárið 2021-2022

## FINA stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg og SSF hava til nú, hetta svimjiárið, skipað fyri tilsamans 6 FINA-góðkendum svimjistevnum í svimjihallum, harav einari meistarastevnu, har málbólkurin vóru føroysk børn, ung og vaksin. Tríggjar svimjistevnur máttu avlýsast vegna koronu.

| Stevna | Staður | Dagfesting | Hylur | Kapp. | Feløg | Íðkarar | Lið | Úrslit | FINA* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HS Open | Tórshavn | 11.-12.sep.21 | 25m | 41 | 5 | 64 | 25 | 439 | 674 |
| Ægir Open - avlýst | Klaksvík | 23.-24.okt.21 | 25m | | | | | | |
| FMS/JMS | Tórshavn | 12.-14.nov.21 | 25m | 86 | 5 | 57 | 52 | 605 | 682 |
| SuSvim Open | Vágur | 27.-28.nov.21 | 50m | 38 | 4 | 54 | 10 | 360 | 641 |
| ABMS - avlýst | Klaksvík | 10.-12.des.21 | 25m | | | | | | |
| SuSvim Open - avlýst | Vágur | 5.-6.feb.22 | 50m | | | | | | |
| Ægir Open | Klaksvík | 19.-20.feb.22 | 25m | 50 | 5 | 79 | 0 | 541 | 663 |
| HS Open | Tórshavn | 12.-13.mar.22 | 25m | 42 | 5 | 83 | 36 | 478 | 646 |
| SuSvim Open | Vágur | 2.-3.apr.22 | 50m | 38 | 4 | 63 | 12 | 399 | 551 |

## Aðrar stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg hava hartil til nú skipað fyri 3 stuttleikastevnum, hetta svimjiárið, fyri okkara yngstu aldursbólkar: HS-stevna í Tórshavn hin 25. sep. 21, SuSvim-stevna í Páls Høll 2. okt. 21 (har tey svumu breiddir), og SuSvim-stevna á Tvøroyri 3. Mars.

3 stuttleikastevnur máttu avlýsast, FS-stevnan 30. okt. 21 og FLOT-stevnan 22. jan. 22 vegna støðuna við korona, og Reysta-stevnan 19. mar. 22 vegna tekniskar trupulleikar.

# Uttanlanda og altjóða stevnur

Føroyskir svimjarar eru so smátt slopnir uttanlanda aftur at kappast, um enn eitt bakkast var við koronu um ársskiftið 2021/22.

| Stevna | Land | Dagfesting | Hylur | Íðkarar | Lið | Úrslit | Gull | Silvur | Bronsa | FINA* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| SSG GP1 | SWE | 24-26.sep.21 | 25m | 9 | 3 | 45 | 0 | 0 | 4 | 726 |
| NM/NJM 2021 | SWE | 3.-5.des.21 | 25m | 9 | 3 | 34 | 0 | 1 | 1 | 714 |
| HMS 2021 | UAE | 16.-21.des.21 | 25m | 4 | 2 | 8 | 0 | 0 | 0 | 690 |
| RIG 2022 | ISL | 28.-30.jan.22 | 50m | 21 | 0 | 128 | 2 | 6 | 6 | 679 |
| BSF 2022 | NOR | 1.-3.apr.22 | 50m | 9 | 0 | 53 | 0 | 0 | 0 | 674 |

# Landsliðshópar 2021-2022

## NM/NJM 2021 í Upplands Väsby, Svøríki

**Svimjarar (9)**: Elisabeth Erlendsdóttir (2005), Eyðrið Mortensen (2005), Ronja Ró í Dímun (2002) og Bartal E. Eidesgaard (2003) úr HS, Lea Osberg Højsted (2008), Róa Trygvadóttir (2008) og Heini M. Askham (2006) úr Ægir, Alisa Vestergård (2003) úr SuSvim, Jóhanna Ólavsdóttir (2007) úr FS. Vár E. Eidesgaard (2001) og Johan N. Dam (2002) úr HS vóru eisini úttikin, men góvu avboð.

**Venjari**: Kristian Martin Joensen og Panagiotis Christou

**Ferðaleiðari**: June Jónsveinsdóttir

## HMS 2021 í Abu Dhabi, Sameindu Arabisku Emirríkini

**Svimjarar (4)**: Elisabeth Erlendsdóttir (2005), Bartal E. Eidesgaard (2003) og Johan Nónskarð Dam (2002) úr HS, Alisa Vestergård (2003) úr SuSvim. Vár E. Eidesgaard var eisini úttikin, men gav avboð.

**Venjarar**: Kristian Martin Joensen og Panagiotis Christou

**Ferðaleiðari**: Lis Gøthe í Jákupsstovu

## BSF 2022 í Bergen, Noregi

**Svimjarar (9)**: Elisabeth Erlendsdóttir (2005), Ronja Ró í Dímun (2004), Eyðrið Mortensen (2003) og Bartal E. Eidesgaard (2003) úr HS, Alisa Vestergård (2003) og Bartal Debess (2002) úr SuSvim, Lea Osberg Højsted (2008) og Jonna Joensen (2005) úr Ægir, og Jóhanna Ólavsdóttir (2007) úr FS

**Venjari**: Kristian Martin Joensen

**Ferðaleiðari**: Astrid Bergtóra Joensen

# Føroysk met og juniormet

Føroyskir svimjarar hava til nú sett 10 føroysk met og 10 føroysk juniormet hetta svimjiárið 2021-2022, tað vil siga frá 1. september 2021 til 30. august 2022.

Til samanberingar settu føroyskir svimjarar tilsamans 9 føroysk met og 4 føroysk juniormet, undanfarna svimjiárið 2020-2021.

## Føroysk met

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x50 | Blandað | 25m | Mix | 02:01.18 | Elin Christiansen<br>Rani Jacobsen<br>Alisa Vestergård<br>Bartal Debess | 2001 | SuSvim | HS Open | 2021-09-12 | FAR |
| 4x100 | Blandað | 25m | Mix | 04:03.50 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Johan N. Dam<br>Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | SSG GP1 | 2021-09-24 | SWE |
| 4x50 | Frí | 25m | Mix | 01:50.07 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Bjørg Ólavsdóttir<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Dávid Gislason | 2003 | HS | FMS | 2021-11-12 | FAR |
| 4x50 | Frí | 25m | Mix | 01:43.41 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Eyðrið Mortensen<br>Johan N. Dam | 2002 | HS | FMS | 2021-11-12 | FAR |
| 4x100 | Frí | 25m | Mix | 04:01.31 | Bartal E. Eidesgaard<br>Ronja Ró í Dímun<br>Elisabeth Erlendsdóttir<br>Jonas L. Schiller | 2003 | HS | FMS | 2021-11-14 | FAR |
| 4x100 | Frí | 25m | Mix | 03:50.92 | Ronja Ró í Dímun<br>Johan N. Dam<br>Elisabeth Erlendsdóttir<br>Bartal E. Eidesgaard | 2002 | HS | FMS | 2021-11-14 | FAR |
| 4x50 | Frí | 25m | Mix | 01:42.65 | Bartal E. Eidesgaard<br>Johan N. Dam<br>Elisabeth Erlendsdottir<br>Alisa Vestergård | 2002 | SSF | HMS | 2021-12-17 | UAE |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x50 | Blandað | 25m | Mix | 01:52.53 | Bartal E. Eidesgaard<br>Johan N. Dam<br>Elisabeth Erlendsdottir<br>Alisa Vestergård | 2002 | SSF | HMS | 2021-12-18 | UAE |
| 4x50 | Blandað | 25m | Mix | 02:00.47 | Jonna Joensen<br>Lea Osberg Højsted<br>Heini M. Askham<br>Líggjas Joensen | 2005 | Ægir | HS Open | 2022-03-12 | FAR |
| 4x50 | Blandað | 25m | M | 01:48.36 | Bartal Debess<br>Jón Hofgaard<br>Róland Toftum<br>Rúni Dahl | 1992 | SuSvim | HS Open | 2022-03-12 | FAR |

## Føroysk juniormet

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x50 | Blandað | 25m | Mix | 02:05.16 | Jonna Joensen<br>Lea Osberg Højsted<br>Heini M. Askham<br>Líggjas Joensen | 2005 | Ægir | HS Open | 2021-09-12 | FAR |
| 4x50 | Blandað | 25m | Mix | 02:03.23 | Bartal E. Eidesgaard<br>Bjørg Ólavsdóttir<br>Elisabeth Erlendsdóttir<br>Snorri F. Mortensen | 2003 | HS | HS Open | 2021-09-12 | FAR |
| 4x50 | Frí | 25m | Mix | 01:50.07 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Bjørg Ólavsdóttir<br>Bartal E. Eidesgaard<br>David Gislason | 2003 | HS | HS Open | 2021-09-12 | FAR |
| 4x50 | Frí | 25m | Mix | 01:48.63 | Jonna Joensen<br>Lea Osberg Højsted<br>Heini M. Askham<br>Líggjast Joensen | 2005 | Ægir | HS Open | 2021-09-12 | FAR |
| 4x100 | Blandað | 25m | Mix | 04:42.29 | Elin Christiansen<br>Rúni Dahl<br>Hans Jacob Hjelm<br>Bjørk L. Sørensen | 2003 | SuSvim | FMS | 2021-11-13 | FAR |
| 4x100 | Blandað | 25m | Mix | 04:31.49 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Ronja Ró í Dímun<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Johannis Erlendsson | 2003 | HS | FMS | 2021-11-13 | FAR |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x100 | Frí | 25m | Mix | 04:01.31 | Bartal E. Eidesgaard<br>Ronja Ró í Dímun<br>Elisabeth Erlendsdóttir<br>Jónas L. Schiller | 2003 | HS | FMS | 2021-11-14 | FAR |
| 4x100 | Frí | 25m | Mix | 03:58.80 | Lea Osberg Højsted<br>Líggjas Joensen<br>Heini M. Askham<br>Róa Trygvadóttir | 2006 | Ægir | FMS | 2021-11-14 | FAR |
| 50 | Rygg | 25m | Kyn | 00:28.63 | Elisabeth Erlendsdóttir | 2005 | HS | NJM | 2021-12-03 | SWE |
| 4x50 | Blandað | 25m | Mix | 02:00.47 | Jonna Joensen<br>Lea Osberg Højsted<br>Heini M. Askham<br>Líggjast Joensen | 2005 | Ægir | HS Open | 2022-03-12 | FAR |
| 4x50 | Blandað | 25m | Mix | 01:47.21 | Jonna Joensen<br>Heini M. Askham<br>Róa Trygvadóttir<br>Lea Osberg Højsted | 2006 | Ægir | HS Open | 2022-03-12 | FAR |

# Annað virksemi 2021-2022

## Altjóða virksemi

SSF luttekur so vítt gjørligt altíð á teimum altjóða pallum, har vit væntast at luttaka, so sum í norðurlendska svimjisambandinum NSF, í norðurlendska lívbjargingarbólkinum NLSG, í evropeiska svimjisambandinum LEN, í altjóða svimjisambandinum FINA, umframt nú eisini í evropeiska lívbjargingarsambandinum ILSE og altjóða lívbjargingarsambandinum ILS.

Í tíðarskeiðnum síðani seinasta aðalfund, vóru tiltøkini í øllum førum (íroknað ætlaðu tiltøk):

- 5. juni 2021: FINA kongress í Doha, Katar
- 18. september 2021: Stovnandi E4AA-fundur í Zagreb, Kroatia
- 24. september 2021: NSF ársfundur í Budapest, Ungarn
- 25. september 2021: LEN kongress í Budapest, Ungarn
- 17. desember 2021: NSF fundur í Abu Dhabi, Sameindu Arabisku Emirríkini
- 18. desember 2021: FINA eyka-kongress í Abu Dhabi, Sameindu Arabisku Emirríkini
- 19. januar 2022: NSF aðalskrivarafundur á netinum
- 5. februar 2022: LEN eyka-kongress í Frankfurt, Týsklandi

# Onnur SSF-tiltøk

SSF roynir eftir førimuni at skipa fyri stimbrandi tiltøkum í Føroyum og fyri føroyingar, afturat sjálvum kappingunum, til at betra um samstarv og førleikar hjá okkum innan svimjingini, og til at vaksa um áhugan fyri svimjing sum heild.

Í tíðarskeiðnum síðani seinasta aðalfund, vóru tiltøkini í øllum førum (íroknað ætlaðu tiltøk):

- ~~7. - 9. mars 2022: FINA dómarskeið í Tórshavn~~ - avlýst
- 17. apríl 2021: SmartPaddle-test í Klaksvík
- 26. august 2021: Tempus sjósett
- 17. - 19. september 2021: Landsliðslega í Klaksvík
- 18. september 2021: Svimjiskúlaskeið á Toftum
- 6. desember 2021: 200m-átak sjósett
- 2. mars 2022: Kalendarafundur í Saltangará
- 18. - 20. mars 2022: Landsliðslega í Klaksvík
- 18. - 20. mars 2022: Dómaraskeið í Tórshavn

# Stutt um okkara limaskapir

## ÍSF

ÍSF skipar tvær ferðir um árið fyri umboðstingum, har formenn og -kvinnur í sersambondunum møtast til at viðgera ymisk viðurskifti, ímillum árligu aðalfundir. Hetta seinasta árið hevur viðgerðin serliga verið um nýggja ÍSF-húsið, umframt nú í 2022 um ætlaðu strategi ÍSF og um Føroyaleikir. Hartil fundast vit árliga við fíggjarnevnd ÍSF.

## NSF

SSF yvirtók í 2021 forfólksskapin í norðurlendska svimjisambandinum NSF, tá ið ársfundur var hin 24. september 2021. Nógv virksemi hevur verið síðani tá, fyrst vegna stríðsvalið í LEN sum byrjaði um somu tíð, og síðani vegna russisku innrásina í Ukraina, nú í 2022. Nógvir netfundir hava verið, umframt fysiskur fundur ísv. við HMS í Abu Dhabi. Aðalskrivarafundur var á netinum í januar 2022.

## LEN

Í LEN hevur verið rok hetta árið, vegna ynski um útskifting í ovastu leiðslu LEN, sum spíraði við einum fundi í Zagreb hin 18. september 2021, ið viðførdi at eitt formligt ynski um nýval var lagt fyri aðalfund LEN hin 25. september 2021. SSF hevur verið partur av hesum ynski síðani byrjan, sum virkin limur í rørsluni 'Europe 4 All Aquatics', og hevur afturfyri fingið pláss í ovastu leiðslu LEN.

Í dag er undirritaði SSF-formaður bureaulimur í LEN við ábyrgd fyri øllum miðlapartinum umframt einum nýggjum og vónandi munadyggum átaki til at breiða út svimjiførleika í Evropa. Hetta eru sera spennandi uppgávur, og kennist tað væl at vera partur av einum felagsskapi, sum hevur so mikið breiða undirtøku millum eropeisku svimjitjóðirnar, har syndarliga kríggið í Ukraina tó órógvar nógv.

## FINA

Í FINA eru eisini stórar broytingar, nú nýggjur forseti varð valdur á kongressini í Doha í juni 2021, saman við nýggjari stjórn. Har vóru stórar útskiftingar í leiðsluni, og ynskir nýggja stjórnin við nývalda forsetanum á odda at nýgera FINA, har millum annað evstalógin verður fullkomiliga endurskoðað, og har nýggjar reglur og leiðreglur vera innførdar, serliga til at bøta um hjá íðkarunum.

### ILS/ILSE/NLSG

Í altjóða lívbjargingini var aftur hetta árið sera friðarligt, vegna koronufarsóttina. Ætlaði aðalfundurin og ráðstevnan var útsett, sum skuldi verða í Sri Lanka á heysti 2022, til nú í staðin at verða á heysti í 2023, og HM í lívbjarging varð útsett til á heysti í 2022. Vegna hesar útsetingar, hevur eisini verið sera friðarligt í norðurlendska lívbjargingarsamstarvinum NLSG.

## Onnur tiltøk

### Úrval

Úrval játtaði til 2021 oyramerktan stuðul til hesar fýra svimjarar: Vár E. Eidesgaard (2001) og Bartal E. Eidesgaard (2003) úr Havnar Svimjifelag, Signhild Joensen (2000) úr Ægir, og Róland Toftum (1998) úr Suðuroyar Svimjifelag. Harumframt aftur játtan til '15 tey næstbestu'.

Til 2022 játtaði Úrval so aftur oyramerktan stuðul til hesar 2 svimjarar: Vár E. Eidesgaard (2001) og Elisabeth Erlendsdóttir (2005). Harumframt aftur játtan til '15 tey næstbestu'.

Umsitingarvirksemið ísv Úrval er komið í fasta legu hjá okkum, men var tað trupult hjá okkara íðkarum at finna loysnir til at kunna brúka sína játtan, so at tað mesta nú má flytast aftur til Úrval. Hetta kostar lutfalsliga nógv fyri SSF í rentu av innstandandi, nú bankarnir hava innført hetta gjald.

### Landslið

Aftaná eina árarekkju, har vit hava klárað okkum við at velja út venjarar úr feløgum til hvørja landsliðsuppgávu sær, valdi SSF í juni 2021 at seta Kristian Martin Joensen til landsliðsvenjara, við ábyrgd fyri at skipa fyri landsliðsvenjing her heima, umframt at standa á odda fyri landsliðsvirkseminum eisini úti í heimi.

Aftur her hevur korona órógvað, so at pláss til dømis ikki var fyri ætlaðu landsliðslegum; men er hetta nú við at koma í rætt lag. Tvær landsliðslegur hava verið - ein á heysti í 2021 og ein nú í mars 2022, umframt at landsliðsvenjarin hevur verið við til landsliðsuppgávurnar NMU 2021, NM/NJM 2021, HMS 2021 og nú Bergen Swim Festival 2022.

## FOASP

SSF hevur síðani 2018 gjørt íløgur í testútgerð og annað, sum liður í sokallaðu FOASP verkætlanini, har FINA bjóðar fíggjarligan stuðul til menning av sersambondunum. Útgerð er keypt og roynd; men tíverri hevur tað verið trupult at fáa í veruliga nýtslu, fyrst vegna avbjóðingar av venjaraskiftum í feløgum, og síðani vegna koronu. Tað riggar t.d. illa at skiftast um at anda í masku í koronu-tíðum.

Vit skiftu tí til at søkja til loysnir ið vóru einfaldari at innføra, sum til 2021 vóru:

1) Víðkan av loysnini hjá SSF til stroyming frá svimjistevnum
2) Keyp av stevnuskipanini Tempus
3) Skeið fyri nýggjum dómarum
4) Viðlíkahald av testútgerð

Tíverri mátti dómaraskeiðið avlýsast vegna væntandi undirtøku; men hini trý punktini vórðu avgreidd sum ætlað, við onkrum eyka ískoyti tá eisini.

Til í 2022 hava vit gjørt umsóknina enn einfaldari, har søkt er um stuðul til heilt tryggar loysnir, ið eru:

1) Stevnuskipanin Tempus
2) Hald (forrit) ísv stroymingarloysnina
3) Hald (forrit) ísv testútgerð
4) Skeið fyri nýggjum dómarum
5) Luttøka á Bergen Swim Festival 2022

Her er alt faktiskt longu avgreitt, íroknað dómaraskeið og Bergen Swim Festival 2022.

Stuðulin frá FINA er USD 15.000 til nú í 2022, har hann til í 2021 var USD 20.000. Orsøkin til hesa minking eru, at nýggja FINA í september 2021 innførdi eina røð av krøvum til ‘good goverance’, har vit vóru mett til at vera á ‘basic’ støði, ið gevur USD 15.000. Uppskot, ið fyriliggja til samtyktar, til aðalfundin nú, skuldu gjarna lyft okkum upp á medium’ støði, ið gevur USD 22.500, um ikki ‘high’ støði og USD 30.000.

## Útbúgving

Nú í mars 2022 fingu vit endiliga útbúgvið ein hóp av dómarum aftur, aftaná eitt tíðarskeið har serliga korona órógvaði. Vit hava haft FINA-skeið í boði bæði til dómarar og venjarar, sum tíverri

máttu útsetast vegna avbjóðingar við koronu. Men síðani gjørdi SSF á heysti í 2021 eina formliga avtalu við Dansk Svømmeunion, sum gav úrslit við einum væleydnaðum skeiði í mars 2022.

Nú arbeiða vit við at fáa í lag aftur eitt umfar av FINA-venjaraskeiðum, har avbjóðingin er at sleppa undan strongu koronukrøvunum hjá FINA, sum tykjast óneyðug nú her í Føroyum. Samstundis tykist so smátt at vera áhugi fyri skeiðum aftur í Merkjaskipanini, bæði millum feløg og skúlar.

## Tøkni

SSF mennir javnt og samt um sínar tøkniligu skipanir, til at lætta um hjá okkum og øðrum í felagsskapinum, væl vitandi at tað serliga er arbeiðskraftin, sum er fløskuhálsur í føroyskari svimjing. Í 2021 var stevnuskipanin Tempus okkara stóra íløga, har keypið tí eisini varð lagt fyri sjálvan aðalfundin at góðkenna, og har royndirnar nú tíbetur hava verið sera góðar.

Nú er nógv lættari hjá luttakandi feløgum at melda til svimjistevnur, og nógv færri trupulleikar av væntandi tilmeldingum, samstundis sum fyriskiparar og SSF hava fingið betri amboð til at seta upp stevnur og fylgja við. Øll føroysk svimjiúrslit verða nú skrásett eisini har til framtíðar uppslag og greining, og sum aftur kann brúkast til dømis til úttøku av landsliðum og vísing av styrkislistum.

Til í 2022 hava vit sum so ongar aðrar ætlanir við tí tøkniliga, enn at styrkja um hesar loysnir ið rigga, og at áhaldandi royna at minka um kompleksitetin. Ein avbjóðing er tó beint nú, at okkara til nú ókeypis loysn frá Google til teldupost og online goymslu, nú í næstum fer at kosta per brúkara. Vit noyðast tí at umhugsa, hvat ið sparast kann burtur her, og møguliga at skifta veitara.

## Antidoping

Føroysk svimjing tekur sjálvsagt fult undir við miðvísa arbeiðinum hjá ÍSF saman við Antidoping Danmark og øðrum, at basa møguligari doping í ítrótti. Tí hava vit eisini eftir áheitan frá ÍSF lagt hendan boðskap út á heimasíðu okkara, við leinki til viðkomandi myndugleikar.

## GDPR

Í 2021 kom nýggja løgtingslógin um vernd av persónupplýsingum í gildi, sum eisini vit ítróttarsambond og -feløg mugu halda okkum til. Tað kom kanska eitt sindur knappliga á breddan, men royna vit okkara frægasta til at gera eisini hetta so væl sum gjørligt.

## Breidd

Hetta tíðarskeiðið skipaði SSF endiliga fyri einum rættiligum breiddartiltaki aftur, tá ið vit í desember 2021 sjósettu svimjiførleikaátakið "Klárar tú 200?", við sjálvum løgmanni sum fyrsta svimjara, og við góðari hjálp frá svimjihallum og eldsálum runt landið. Nú átakið so smátt er um at vera liðugt, vegna væntandi nálir, eru tey knøpp 1400 sum hava svomið seg til hesa nál, ið prógvar, at tey eru svimjarar.

## Svimjiførleiki

Í 2021 gjøgnumførdu vit eina svimjiførleikakanning, sum vit tíverri ikki enn hava haft stundir at greina, har vaksin vórðu spurd umvegis Gallup-kanning, og har øll fimtafloksbørn í Føroyum síðani vórðu spurd við spurnarbløðum í skúlunum. Alt tilfarið er komið inn, men væntar skrásetingin av svarunum úr spurnarbløðum at tøppast inn og greinast á teldu. Tá ið hetta arbeiði er gjørt fáa vit yvirlit yvir hvussu støðan er.

## Svimjihallir

Umboð fyri SSF eru í fyrireikingarbólkum bæði í sambandi við ætlaða langhylin í Tórshavn, og við ætlaða stutthylin í Runavík. Hetta er virksemi, sum krevur tolsemi, men komu vit á heysti 2020 til tað stóru løtu, at byrjað var uppá langhylin í Tórshavn. Eftir ætlan stendur hann klárur longu síðst í 2023, og eru runavíkingar vónandi eisini komnir langt við sínum hyli tá.

## Skrivstova hjá ÍSF

Sum avleiðing av byrjanini uppá langhylin í Havn, so var ÍSF-húsið tikið niður á heysti í 2020, ið so aftur viðførdi,at SSF vegna goymslutørv flutti til góðar umstøður hjá Runavíkar kommunu í Saltangará. Har eru vit enn, samstundis sum at nýggi aðalskrivarin hevur fingið pláss til at kunna arbeiða eisini í fyribils ÍSF-húsinum á Frælsinum í Havn. Hetta riggar væl, halda vit sjálvi, i øllum førum fyribils.

## Stuðlar

Høvuðsstuðul hjá Svimjisambandi Føroya er Atlantic Airways, sum hevur verið hollur stuðul í nú mong ár. Hartil hava vit nógvar aðrar trúgvar stuðlar serliga í sambandi við okkara meistarastevnur, umframt at fáa góðan stuðul frá teimum kommunum og felagsskapum sum vit nú einaferð hoyra til.

# Niðurløga

Hetta var so hitt áttanda árið hjá mær sum SSF-formanni, ella 7½ um vit taka við, at vit í 2018 fluttu aðalfundin frá at verða um heystið, til í staðin at verða um várið longu frá í 2019.

Eisini í ár vóru stórar avbjóðingar, tí fyrst skuldu vit stríðast við at koma í gongd aftur aftaná koronu, og síðani fór korona fyrst av álvara at herja aftur, út á veturin 2021 og inn í 2022.

Men, tað gongur framá. Vit hava fingið landsliðsvenjara aftur frá í juni 2021, og vit hava fingið aðalskrivara aftur frá í mars 2022. Í báðum førum sera væleydnaðar setanir, haldi eg.

Nú eru vit vónandi komin hartil, at korona er mestsum ein vanlig sjúka, so at skilja at vit ikki longur á sama hátt skulu ansa okkum og laga niður, meira enn í sambandi við aðrar smittandi sjúkur.

Ein landsliðsætlan fyriliggur, og kalendarin er fullur av spennandi avbjóðingum, samstundis sum ovmikið er av møguleikum til at kunna fara undir nýggj og øðrvísi tiltøk eisini.

Avbjóðingin er sum altíð at hava fólk til hetta ymiska, tá ið talan er um ein í stóran mun sjálvbodnan felagsskap sum okkara. Tað eru snøgt sagt tøku hendurnar, sum avmarka, hvussu langt vit røkka.

Eg vil nýta høvið til at takka tykkum mongu, sum alsamt stríðast við at fáa hetta ymiska til at hanga saman, so at svimjingin hóast alt er so góð og vælskipað, sum hon er.

Nú er at koyra á, føroyskari svimjing at frama!

við svimjikvøðu,
Saltangará 8. apríl 2022
vegna starvsnevnd SSF
Rókur í Jákupsstovu